# Hvussu miðbýurin kann betrast

*Gilli Tróndt, býarfrøðingur*

## Vaglið – Hví er Ráhúsplássið eitt parkeringspláss?

Vaglið byrjar í dag við grótmúrarnar á Tinghúsvegnum og endar á parkeringsplássinum frammanfyri Býráðshúsið. Við at opna urtagarðarnar við Tinghúsvegin fær býurin betri gangn av teimum grønu økjunum, og við at gera Vaglið til eitt torg, fær býurin eitt naturligt savningsstað fyri kreativa vinnu. Bilarnir kunnu setast í eitt parkeringshús aftanfyri, ella við at gera tunlar inn í heyggin - niðasta mynd til høgru





